

*Hoyvíkingar knúgvaðu neistamonnum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Vit fara í finaluna

**HONDBÓLTUR** Jan Ottesen, venjari hjá KÍF, er sannførdur um, at kollfirðingar spæla finalurnar um føroyameistaraheitið móti Neistanum

Uni Holm Johannesen

Tað er 95 prosent vist, sigur venjarin hjá KÍF.

Fá høvdu væntað, at H71 fór at vinna á Neistanum í gjár. Kollfirðingar greiddu sína skyldu í Vestmanna. Úrslitini hava við sær, at hoyvíkingar kunnu framvegis fáa KÍF aftur á stigatalvuni.

Jan Ottesen, venjari hjá KÍF, ber ongan ótta fyri, at tað fer at miseydnast.

– Vit mangla eitt stig og skulu spæla móti H71, StÍF og Kyndil. Eg stúri ikki, sigur hann.

KÍF var aftan fyri við tveimum málum, tá 10 minuttir restaðu í. So fór heimaliðið upp í ferð og vann greitt, 26-21.

### Neistin tapti

Oddaliðið Neistin tapti fyri fyrstu ferð í hesum kappingarárinum í gjár. H71 vann 30-28 í høllini á Hálsi. Neistin hevur einki havt at spælt fyri seinastu vikurnar, tí finaluplássið var tryggjað fyri fleiri vikum síðani. Tað tekur einki frá avrikinum hjá hoyvíkingum, sum spældu væl.

H71 skal spæla seinastu dystirnar móti Team Klaksvík, KÍF og VÍF.

*uni@sosialurin.fo*

## Sunset Deildin *Kvinnur*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIN MÁL | TAPT MÁL | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Neistin | 22 | 631 | 497 | 134 | 34 |
| 2 | Stjørnan | 20 | 568 | 469 | 99 | 34 |
| 3 | Tjaldur | 21 | 592 | 508 | 84 | 32 |
| 4 | VB | 21 | 532 | 526 | 6 | 22 |
| 5 | Kyndil | 22 | 506 | 550 | -44 | 14 |
| 6 | VÍF | 20 | 451 | 563 | -112 | 7 |
| 7 | StÍF | 20 | 398 | 565 | -167 | 3 |

Stjørnan – Kyndil 30-27
Neistin – Tjaldur 40-19
VB – VÍF 30-28

## Atlantic Airways Deildin *Menn*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIN MÁL | TAPT MÁL | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Neistin | 22 | 768 | 608 | 160 | 41 |
| 2 | KÍF | 21 | 597 | 542 | 55 | 28 |
| 3 | VÍF | 22 | 626 | 577 | 49 | 23 |
| 4 | H71 | 21 | 579 | 564 | 15 | 22 |
| 5 | Kyndil | 22 | 569 | 583 | -14 | 21 |
| 6 | StÍF | 21 | 545 | 558 | -13 | 13 |
| 7 | Team Klaksvík | 21 | 500 | 752 | -252 | 2 |

Team Klaksvík – Kyndil 25-31
Neistin – H71 28-30
KÍF – VÍF 26-21

# BANK



*Adina Petrea og Tjaldur taptu stórt fyri Barbaru Brauer og Neistanum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**HONDBÓLTUR** Neistin bukaði Tjaldri sundur í oddadystinum í gjár. Kvinnurnar úr Runavík eru undir trýsti undan dystinum móti Stjørnuni sunnudagin

Uni Holm Johannesen

Tað, sum vendi upp, vendir nú niður. Neistin hevði knívin á barkanum undan oddadystinum móti Tjaldri í gjár. Neistin vann. Snøgt sagt sorlaði mótstøðuliðið sundur. Nú er Tjaldur undir trýsti. Kvinnurnar úr Runavík spæla móti Stjørnuni sunnudagin. Tapa steypavinnararnir, kunnu tær ikki gera av einsamallar, hvør skal spæla finalurnar.

Støðan er íkomin, tí Neistin beinleiðis vant burtur úr Tjaldri í høllini á Hálsi í gjár. Oddadystur, men 21 mál skilti liðini. Eyðmýkjandi fyri gestirnar.

### Óskiljandi

Tað var, sum spældi Neistin fyri lívinum í gjár. Heimaliðið legði bragdliga fyri, og beinanvegin var munurin fimm mál. Barbara Brauer, Jacklin Djurhuus og Unnur Danielsen gingu undan í álopsspælinum, og Simona Petersen og Adina Petrea, stórskjúttarnir hjá Tjaldri, fingu lítið pláss, tá tær royndu at hótta verjuna hjá Neistanum. Gestirnir høvdu einki at svara aftur við. Adina Petrea var sjúk í síðstu viku, og tað darvaði hennara spæl. Annika Thomsen var ikki við. Hon er skadd. Tøkar ella ikki, Neistin var stórspælandi í gjár.

12 mál vóru á muni í hálvleikinum – 22-10. Eftir hvíldina gav Birgir Hansen, venjari hjá Neistanum, ungu spælarunum møguleikan. Munurin bara øktist. Endaliga úrslitið var 40-19.



*Sorl í høllini á Hálsi. Neistin vann oddadystin við 19 málum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Liðini finnast

Trý lið kappast um finalusess. Tjaldur er undir trýsti. Eitt tap fyri Stjørnuni sunnudagin hevur við sær, at kvinnurnar úr Runavík er fýra stig frá finaluplássi, um Neistin vinnur á botnproppinum StÍF. Í síðsta umfari, tann 10. apríl, spæla Neistin og Stjørnan.

*uni@sosialurin.fo*

# Simona gevst

Simona Petersen, stórskjúttin hjá Tjaldri, sigur við portalin 24timar.com, at hon spælir neyvan hondbólt næsta kappingarár. Hon hevur spælt hondbólt á hægsta stigi í Føroyum í fleiri ár, og tað fer við nógvari tíð. Nú er ætlanin at brúka frítíðina saman við familjuni og vinunum.

Simona Petersen, ætta úr Litava, hevur spælt við Neistanum, Stjørnuni og Tjaldri.

*uni@sosialurin.fo*